

*Friðurin á Skarvanesi er til at føla og merkja. Her hevur tú góða tíð og einki stress tykist órógva teg – sjálvt hønurnar njóta gott av hesum*

# Skarvanes – her tíðin stendur í stað

**Mong hildu, at Skarvanes var útdeyð. Men ein havnarmaður vildi tað øðrvísi**

NÝBÚGVI
*Orð/myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Skarvanes:** – Poul Jákup? Nei, góðin. Hann gongur ikki so laangt sum hann er laangor!

Ein maður er í ferð við at umvæla eitt av minnu húsunum í bygdini, tá umboðið fyri tíðindatænastuna kemur framvið.

Endamálið er at fáa orð á tann nýggja og einasta fasta íbúgvan í hesi lítlu fjarskotnu bygdini á Sandoynni.

Fleiri hús eru at velja millum – okkurt hvítt, okkurt reytt og fleiri gul. Við eitt teirra er ein maður til arbeiðis, og hagar verður leitað fyri at fáa at vita, hvar bústaðurin hjá Poul Jákupi Thomsen er.

Hann peikar móti einum hvítum húsum, fyrst í bygdini. Fyrst kemur skúlin og síðani húsini hjá havnarmanninum.

– Tú sært handa skutarin standa omanfyri húsini. Poul Jákup brúkar hann at koyra við, – ja, sjálvt tann stutta teinin her oman í bygdina!, sigur hann við einum lítlum skálkasmíli.

Hann fer aftur til arbeiðið sítt, og umboðið fyri Sosialin fer niðan til húsini hjá fyrrverandi havnarmanninum. Tey liggja bert eitt skarvslop higani.

– I'm coming!, ljóðar av loftinum.

Hann er í ferð við at gera seg kláran til enn ein dag við undirvísing, samtalu og vitjan av blaðmanni. Her er einki hektiskt yvir nøkrum. Alt verður gjørt í sínum tempo. Tíðin stendur mestsum í stað.

Her valdar friður inni og friður úti. Og friður í sálini.

### Harri miskunna

Tað eru kanska ikki øll sum vita hvar Skarvanes er, ella hava verið í hesi lítlu, men so hugnaligu bygdini.

Skúlaflokkar og fyritøkur gera ofta útferðir í Sandoynna, og hjá fleiri teirra er ein partur av ferðini at ganga úr Dali til Skarvanes ella øvugt. Hetta skal vera ein sera vakur gongutúrur, sigst.

Koyrir tú hinvegin eftir vegnum heiman av Sandi til eysturbygdirnar á Sandoynni sært tú vegaskeltið sum vísir tær á teir 5 km. til Skarvanesar.

Hetta er einsporaður vegur, har ein ikki kann koyra so skjótt. Hinvegin so fær tann vitjandi møguleika at eygleiða vøkru náttúruna framvið vegnum og alt fuglalívið, sum finst her.

Tá ein byrjar at nærkast bygdini ber til at fáa eyga á ein stóran stein, sum verður nevndur Kyriusteinar. Í gomlum døgum varð hesin sagdur at vera halgur.

Tá ein fór úr bygdini hevði ein her møguleikan at síggja gamla bønhúsið í bygdini. Her vendi ein sær á og bar fram orðini "Kyrie eleison" (Harri miskunna) og kastaði ein lítlan stein aftur um rygg, áðrenn leiðin varð hildin víðari.

Í dag er bygdarlívið á Skarvanesi meiri merkt av at Familjudeildin hjá Heilbrigdið heldur til her.




*Poul Jákup hevur ikki bil, men bara henda skutarin sum hann hevur arvað eftir sonin. Hann kann brúkast til stuttar túrar oman í bygdina (!) og tá hann fer til Havnar*